# HEILSANIR



**Góði Heðin**
Hjartaliga tillukku við 21 ára føðingardegnum. Vónandi klárar tú at halda bilarnar á vegnum í framtíðini, so onnur sleppa í grind.
**Heilsan, paparazzarnir og kranin**



**Góða Annika**
Hjartaliga tillukku við didduni 18. okt. og føðingardegnum 22. okt. Øll góð ynski fyri framtíðina.
**Heilsan mamma**





**Góðu Rói og Dávið**
Hjartaliga tillukku við 10 og 2 ára føðingardøgunum ynskja
**babba og mamma**



**Góði elskaði Petur Martin**
Hjartaliga til lukku við 3 ára degnum. Jesu pápi signi teg ynskja
**mamma og babba**



**Góða fastir**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum ynskja
**Bodil Maria og Mimmi**



**Góðu Rói og Dávið**
Hjartaliga tillukku við 10 og 2 ára føðingardøgunum og alt tað besta í framtíðini ynskja
**omma og abbi**



**Góði stóribeiggi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 7 ára degnum.
**Rúni og Bembil**



**Góðu fastir og Jógvan**
Hjartaliga til lukku við degnum tann 27.10.02
Tit eru so fitt.
**Heilsan Rakul og Kiara**



**Góði allarbesti stóribeiggi**
Hjartaliga til lukku við 3 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan Kristian**









**Góðu tit øll**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, sum hava verið og verða og alt tað besta.



Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt gleddu og gjørdu hjúnabandsdag okkara 9. aug. 2002 so hugnaligan og ógloymandi.
**Ester & Allan, Eysturskarð**



# FØÐINGAR



26. aug. fingu Erika Nielsen og Tommy M. Jacobsen eina dóttur, ið eitur Lea Arnfríð Jacobsen.

17. sept. fingu Katja Øssursdóttur Nielsen og Henning Kaag, Svendborg, eina dóttur, ið eitur Silja. Hon var 50 cm. og vigaði 3100 gr.

28. sept. fingu Eydna og Steingrím av Vollanum, Fuglafjørður, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3330 gr.

17. okt. fingu Sóleyð og Niels Pauli Nielsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3800 gr.

18. okt. fingu Jane Larsen og Allan Eidesgaard Poulsen, Eiði, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4650 gr.

18. okt. fingu Annika Lávík og Kaj Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4320 gr.

18. okt. fingu Anja Johannesen og Egil Zachariasen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3450 gr.

19. okt. fingu Phitchaya Kitphet og Finnbjørn Poulsen, Lopra, ein son. Hann var 51 cm. og vigaði 2980 gr.

20. okt. fingu Rósalind og Oddmar Suni Olsen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3100 gr.

20. okt. fingu Malin og Jan Zachariassen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 2900 gr.

21. okt. fingu Jonly Johannesen, Skipanes og Elmar Abrahamsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3900 gr.

22. okt. fingu Annika Sørensen og Karl Andreasen, Tórshavn, ein son. Hann var 36 cm. og vigaði 900 gr.

23. okt. fingu Maibritt og Andrass Midjord, Argir, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 4600 gr.

23. okt. fingu Randi og Magni Jarnskor, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3080 gr.

23. okt. fingu Eileen og Sjúrður Ejdesgaard, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3450 gr.

24. okt. fingu Marjun Djurhuus, Selatrað og Eskil Vinther, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3700 gr.

# ANDLÁT

**16. oktober**
Evy Roma Kristensen, í Kollafirði, 22 ár.

**17. oktober**
Signa Elisabeth Nónfjall, ættað av Eiði, búsitandi í Keypmannahavn, 82 ár.

**18. oktober**
Hilmar Hansen, ættaður av Eiði, búsitandi í Klaksvík, 58 ár.

**19. oktober**
Astrid Poulsen, dóttir Johonnu og Ásbjørn Poulsen, Tórshavn, 65 ár

**21. oktober**
Lea Hansen, Sørvágur

**23. oktober**
Jóhanna Sivertsen, Funningi, andaðist í Vestmanna, 70 ár

**24. oktober**
Jona Johansen, Klaksvík, 85 ár

# 85 ÁR

Mánadagin 28. okt. fyllir Hilda Abrahamsen, Tórshavn, 85 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 27. okt. hjá soninum Steingrimi, á Túgvu 3, Tórshavn frá kl. 17.00.

# TILTØK

**Gudstænastur**
**22. sunnud. e Trinitatis**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altarg., Erland Beder og Heri Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein og Henning Nielsen, altarg., skriftamál kl. 10.40
*Hvítanes:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Kvívík:* kl. 12, deyvagudstænasta við altarg., skriftarmál kl. 11.50, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri deyvameinigheitina
*Vestmanna:* kl. 12, Marjun Bæk
*Miðvágur:* kl. 11, altarg., David Johannesen
*Hósvík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Selatrað:* kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Funningur:* kl. 12 messa, Emil Olsen
*Hvannasund:* kl. 12, Elsa Funding
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Eiði:* kl. 12, familjugudstænasta, Uni Næs
*Funningsfjørður:* kl. 17, Uni Næs
*Hvalba:* kl. 12.30 Ólavur Rasmussen
*Vágur:* kl. 11, altarg.,
*Sumba:* kl. 17, Marianne Telling
*Húsavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti, Páll Poulsen talar. Evni: »At geva« Heimasíða www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Biskup Lukas de Hovre, S. J. í Mariukirkjuni, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, major Knut Gamst talar. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17.00 Familjutími, skótarnir skipa fyri. Øll eru vælkomin, drekkamunnur. Mánadagin kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3,*
Mánadagin bønarmøti kl. 20.30.
Sunnudagin, Gudstænasta kl. 11.00 v/ Hendrik T. Olsen, Sunnudagsskúli kl. 14.00, Evang. møti kl.18.00.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti har Jógvan Páll Sevdal og Svenning av Lofti luttaka. Mikukvøldið kl. 20.00 Bønaroguppbyggingarmøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Karsten og Gitte Grønne, Meinigheitskórið syngur.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 15.00 í KFUK: Fundur, tos um arbeiði, (limir).
Mánadagin kl. 14.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Sverra Steinhólm presti. Evni: Esterarbók.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

**Konsert**
Harmoniorkestrið GHM og Rútmiska kórið í Hoydølum hava konsert í høllini í Eysturskúlanum sunnudagin 27. okt. kl. 16.00.

**Glæman í Kvívík**
Vikuskiftismøtini halda fram. Í kvøld kl. 20.00 talar Reimund Langgaard. Ungdómsbólkur úr Eysturoy syngur. Í annaðkvøld kl. 19.00 verður luttøka úr Kollafirði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424471.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 20.00 og undirvísing leygardagin kl. 14.00 – framhald frá seinasta vikuskifti. Drekkamunnur aftaná møti.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og møti kl. 18.00 við Torleif Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið kl. 20.00, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Haldórsvík**
Møti verður í Avhaldshúsinum leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 19.00. Luttøka úr Kelduni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gjógv**
Emil Olsen, prestur heldur fyrilestur í Gjáar samkomuhúsi sunnukvøldið kl. 19.00. Evni: N. F. S. Grundtvig, prestur og sálmaskald. Nakrir av sálmum hansara verða sungnir.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Símun Absalonsen talar.

**Keldan, Skálafirði**
Juniorarbeiði fyri børn 3.-7. fl. byrjar leygardagin kl. 17.30.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús við Jónfinn Olsen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Eyðuni Jacobsen, barnamøti kl. 17.00.
www.keldan.fo

**Glyvra kirkja**
Mánakvøldið kl. 20.30 Musik-andakt.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 17.00 Møti.
Mánadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Eingin sunnudagsskúli sunnudagin vegna Thaborlegu í Nesvik. Møti er kl. 18.00.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranumí kvøld kl. 20.00. Árni Jacobsen luttekur. Tú ert vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagion kl. 17.00 verður familjumøti við Jónu Thomsen, barnaráðgevi hjá Heimamissiónini. Eisini syngur stóra sunnudagsskúlakórið nakrar sangir. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, Hjálgrím Davidsen talar.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti/Alpha-skeið.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 26. okt. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11.00 møta børn 4 ár til 1. flokk, kl. 14.00 møta børn 2.-4. flokk, kl. 17.00 møta børn 5.-6. flokk.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 19.00 Sangløta uppi í Samljóð við Heina Lützen.
Mánadagin kl. 20.00 Systurmissiónin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsongur, kl. 18.00 Møti.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Karl og Elidu Kenning.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.

**Betania, Porkeri**
Ungdómsfundur verður í kvøld kl. 20.00.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Í samband við at felagið verður 45 ár, verða limirnir bodnir til døgurða í húsum felagsins mikukvøldið 06. nov. kl. 19.00. Tekning á tlf. 447018 ella 441199 áðrenn 30. okt.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 28. okt.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 29. okt.:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 **Vit syngja.** Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Málprát – Jóhan W. Poulsen
*Mikudagin 30. okt.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 31. okt.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17.00 **Virka burturúr ullini**. Fríðgerð Rasmussen o.o. Tilm. 316491
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 32. okt.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*